# TILTØK

**Ebenezer**
Í kvøld kl. 20 er Bønar- og uppbyggingarmøti har Símun Pætur á Torkilsheyggi talar.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygarkvøldið kl. 20 talar Ian Burness har evnið verður »Trúgv á Gud í okkara tíð«
Sunnudagin kl. 10 Breyðbróting, kl. 12 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti har Ian Burness frá Echoes of Service talar, kl. 21 Útimøti.
Heimasíðan: www.ebenezer.fo

**Meinigheitshúsið**
Týskvøldið kl. 21 Bíbliutími, Áps. kap. 9, 1-19.
Mikukvøldið kl. 19 venur Meinigheitskórið.
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti v/ Frants Jensen.
Leygarkvøldið kl. 19.30-22 Juniorhugni.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Familjumøti við Durutu og Ejvind Mouritsen.
Mánakvøldið kl. 20 Kvinnumøti.

**Frelsunarherurin, Tórshavn**
Mikudagin kl. 15 Bønarmøti, Títtlingasangur kl. 17.30, Barnarøddir venja kl. 19.
Hósdagin kl. 20 Heimaforbundið.
Sunnudagin kl. 11 Møti v/ Toril og Niels Edvard Olsen, kl. 17 Familjutími við drekkamunni.
Títtlingasangarar skipa fyri. Øll eru vælkomin. (Eingin sunnudagsskúli).

**Tórshavnar Hvítusunnusamkoma**
*Yviri við Strond*
Sunnudagin kl. 11 Morgunmøti, kl. 18 Evangel. møti, øll eru vælkomin.

**Samkoman Immanuel**
Í kvøld kl. 20 Møti.

**KFUM og KFUK í Havn**
Týskvøldið 22. apríl kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantafest, holdini hjá Bergi Debes Joensen og Hera Joensen.
Mikudagin kl. 19 í KFUM: Ten-sing kórið venur.
Kl. 19.30 í KFUK: Konfirmantafest, holdini hjá Sverra Steinhólm og Erland Beder.

**Hebron, Argir**
Í kvøld kl. 20 verður møti har talað verður um evnið: Bønir Paulusar.

**Filadelfia, Landavegur 22**
Í kvøld kl. 19 Delli.
Fríggjakvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Leygardagin kl. 17 Landsbøn.
www.filadelfia.fo

**Samkoman Lívdin**
Sunnumorgin í Hoyvíkar skúla verður familjumøti kl. 10.30 og tilbiðjunarmøti kl. 12, til bæði møtini talar Ian Burness. Barnaansing er fyri børn undir skúlaaldur á báðum møtunum.
Sunnudagsskúlin er kl. 12.
Drekkamunnur er millum møtini.
Týskvøldið kl. 19.30 úti á Fløtum. Bøn og bíbliutími har Zacharias Zachariasen talar um Nehemia. Heimasíðan: www.livdin.fo

**Norðskála**
Hóskvøldið eftir páskir kl. 19.30 níggju-lestra gudstænasta – konfirmantar og Emil Olsen.

**Siloa, Fuglafirði**
Bøn, bíbliulæra og hugnalig samvera verður í Siloa í kvøld kl. 19.30. Símun Absalonsen talar. Evni: Nøvn Guds. Øll eru hjartaliga vælkomin.

**Missónshúsið í Skopun**
Í kvøld kl. 20 Bíbliutími. Øll eru vælkomin.

**Soli Deo Gloria**
Hóskvøldið kl. 20 Ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 14 Sunnudagsskúli, kl. 18 Møti.
Mánakvøldið kl. 20 Bønarmøti.

**Aglow, Klaksvík**
Møti verður á Soli Deo Gloria leygarkvøldið 26. apríl kl. 20. Allar kvinnur eru vælkomnar.

**Missiónshúsið í Hovi**
Missiónsvika verður við møtum fríggjakvøldið og leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18. John S. Myllhamar, trúboðari o.o. tala. Sunnukvøldið er innsavnan.

**Betel, Vágur**
Ónsdagin kl. 20.00: Bønar- og uppbyggingarfundur.

**Møti verður**
leygardagin 26. feb. kl. 19.30 í Zions Kirkens Sognehus, sum liggur á Nygårdsvej 103 í Esbjerg. Árant Johannsen talar. Bønarmøti byrjar kl. 19.

**Tilhaldið**
*í Tórsgøtu 21, tlf. 316491*
Opið er mánadag 10.00-18.00. Týsdag-fríggjadag kl. 10.00-17.00.
Drekkamunnur er at fáa hvønn dag, eins og bløðini eru til taks.
*Týsdagin 22. apríl:*
kl. 10-12 Vit baka
kl. 10-11.30 Sangur, Eyðun Sørensen. Øll eru hjartaliga vælkomin.
kl. 15 Indiskt te. (Filmur um økologiskt landbúrk) Roar Olsen
*Mikudagin 23. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Túrur út í Sandagerð
*Hósdagin 24. apríl*
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 10.30-17 Máling á toy, Solveig Isfeldt. Tilm. 316491
kl. 14-17 Telduprát – Brandur Petersen
*Fríggjadagin 25. apríl:*
kl. 10-17 Opið hús

*Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum – um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.*

**Dagtilhaldið í Vági**
er opið hvønn týsdag og tórsdag frá kl. 15.00-18.00. Øll kunnu vera við.

**Tilhaldið í Sandoynni**
Tilhaldið er opið mánadag og mikudag frá kl. 14–17.00. Drekkamuður er at fáa báðar dagarnar. Øll eru hjartaliga vælkomin.
*Mikudagin 23. apríl:*
Ada á Reynatúgvu lesur seinasta brot úr skaldsøgu.

**Dagtilhaldið Fløvin**
kemur saman mánadag-fríggjadag kl. 15.00-18.00 í húsunum hjá Kongshavnar Kvinnufelag.

**Reyði Krossur Føroya**
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19.00-21.00 á tlf. 319630.
Kennir tú føroying í Keypmannahavn, ið hevur tørv á vitjan ert tú vælkomin at seta teg í samband við Reyða Kross Føroya, Bryggjubakki 10, 100 Tórshavn tlf. 319630/61 655400.

**NA (Anomymir narkomanar)**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Fundur er hvønn hósdag kl. 17.30 til 18.30 og sunnukvøld kl. 20.00 til 21.00.

**AA-fundir í Havn**
Reinsaríið, Tórsgøta 5:
Sporafundur verður mikukvøldið kl. 20-21.
Heimasíða:
http://heima.olivant.fo/~aa-fo/

**Al-Anon**
Fundur fyri avvarðandi at alkoholikarum er hvørt týskvøld og hóskvøld kl. 20 í Al-Anon, Tórsgøta 5 (inngongd vestanfyri). Telefontíð er fríggja-, leygar-, sunnu- og mánadag frá kl. 19-21 á tlf. 508030.

**AA-fundur í Eysturoy**
Á Toftum hvønn týsdag kl. 20 í húsinum norðanfyri skúlan.
Á Glyvrum hvønn fríggjadag kl. 20 í Hvítaskúla. (gamla læraraíbúðin).

**AA-fundir í Vágum**
Í gamla skúla í Sandavági hvørt hóskvøld og leygarkvøld kl. 19.00 (á loftinum, inngongd niðanfyri).

**Al-Anon í Vágum**
Fundur fyri avvarðandi hjá alkoholikarum er hvørt týskvøld kl. 19.30 í Gamla skúla í Sandavági.

**AA-Suðuroy**
AA-fundirnir í gomlu læknamiðstøðini á Tvøroyri eru fríggjakvøld kl. 19 og sunnudag kl. 15.
Hvønn sunnudag síðst í mánaðinum – opin fundur kl. 15.

**AA í Vági**
AA fundir verða í Undirhúsinum onsdag og leygardag kl. 19.00.

## 90 ÁR

Mikudagin 23. apríl fyllir Elsa Margretha Frederiksen, Miðvági, 90 ár. Dagurin verður hildin hjá Joen Paula og Jónrith Frederiksen frá kl. 18.00.




Bilpakkar Summarsiglingin 2003

Tórshavn - Hanstholm ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.900 | 5.580 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.920 | 4.960 | 5.600 | - | - | 7.120 |
| Bilur + 3 fólk | 3.220 | 4.000 | - | 4.780 | 5.200 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.520 | 3.040 | - | - | - | 4.120 |
| Bilur + 1 fólk | 1.720 | 1.960 | - | - | - | 2.520 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 6.600 | 7.380 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 5.280 | 6.560 | 7.520 | - | - | 9.440 |
| Bilur + 3 fólk | 4.340 | 5.300 | - | 6.380 | 6.980 | - |
| Bilur + 2 fólk | 3.380 | 4.020 | - | - | - | 5.460 |
| Bilur + 1 fólk | 2.300 | 2.620 | - | - | - | 3.360 |

Tórshavn - Bergen ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.600 | 4.400 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.880 | 3.520 | 4.000 | - | - | 4.800 |
| Bilur + 3 fólk | 2.320 | 2.800 | - | 3.280 | 3.520 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.760 | 2.080 | - | - | - | 2.720 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.320 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.600 | 5.800 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.680 | 4.640 | 5.280 | - | - | 6.240 |
| Bilur + 3 fólk | 3.000 | 3.720 | - | 4.320 | 4.800 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.280 | 2.760 | - | - | - | 3.560 |
| Bilur + 1 fólk | 1.520 | 1.760 | - | - | - | 2.160 |

Tórshavn - Lerwick ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 2.500 | 3.100 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.000 | 2.480 | 2.880 | - | - | 3.520 |
| Bilur + 3 fólk | 1.640 | 2.000 | - | 2.420 | 2.660 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.280 | 1.520 | - | - | - | 2.040 |
| Bilur + 1 fólk | 880 | 1.000 | - | - | - | 1.260 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 3.300 | 4.200 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 2.640 | 3.360 | 3.760 | - | - | 4.640 |
| Bilur + 3 fólk | 2.180 | 2.720 | - | 3.200 | 3.500 | - |
| Bilur + 2 fólk | 1.700 | 2.060 | - | - | - | 2.700 |
| Bilur + 1 fólk | 1.160 | 1.340 | - | - | - | 1.680 |

Tórshavn - Seyðisfjørður ella hinvegin

| Lágárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 4.200 | 5.000 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 3.360 | 4.000 | 4.560 | - | - | 5.760 |
| Bilur + 3 fólk | 2.740 | 3.220 | - | 3.880 | 4.240 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.100 | 2.420 | - | - | - | 3.300 |
| Bilur + 1 fólk | 1.400 | 1.560 | - | - | - | 2.000 |

| Háárstið | Couchette | 4-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 4-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað innv. | 3-koyggjukamar v. wc/bað útv. | 2-koyggjukamar v. wc/bað útv. |
|---|---|---|---|---|---|---|
| Bilur + 5 fólk | 5.700 | 6.600 | - | - | - | - |
| Bilur + 4 fólk | 4.560 | 5.280 | 6.080 | - | - | 7.680 |
| Bilur + 3 fólk | 3.700 | 4.240 | - | 5.140 | 5.620 | - |
| Bilur + 2 fólk | 2.840 | 3.200 | - | - | - | 4.400 |
| Bilur + 1 fólk | 1.880 | 2.040 | - | - | - | 2.660 |

Treytin fyri omanfyrinevndu bilpakkum er at ferðin byrjar og endar í Føroyum.



SMYRIL LINE
the North Atlantic Link

J. Broncksgøta 37
P.O. Box 370
FO-110 Tórshavn
Faroe Islands
Tel +298 345900
Telefax +298 345950
booking@smyril-line.fo
www.smyril-line.fo






*Ein vælhýrdur Tróndur Patursson við megnar bókaverkinum um list hansara*
*Mynd Jens K. Vang*

# Megnar bókaverk um Trónd Patursson

BØKUR
*Jan Müller*

Ein hin mest fjølbroytti og kendi føroyski listamaðurin gjøgnum allar tíðir man vera Tróndur Patursson. Hann hevur verið sínum verkum og sínum virksemi verið við til at seta Føroyar á heimskortið og gera oyggjarnar úti í Atlantshavi kendar úti í stóru verð. Nú er gjørt stórt bókaverk um listina og listamannin. Tað er danin, Finn Terman Fredriksen, sum hevur skrivað bókina. Hann er leiðari á Randers Kunstmuseum og høvundur at rúgvu av bókum um list.

Bókin er 259 blaðsíður við ikki færri enn 159 myndum. Gunnar Hoydal hevur týtt bókina til føroyskt. Útgevari er Randers Kunstmuseums Forlag. Bókin verður m.a. stuðlað av Mentunnargrunni Landsins og Føroya Sparikassa.

Bókin er ein rættiligur tungvektari og lýsir Trónd bæði sum listarmann og sum menniskja. Hon fylgir Tróndi frá tí at hann byrjaði sum listarmaður og fram til dagin í dag. Hon viðger fyrst og fremst listina men fer eisini afturum persónin og nógv av tí hann hevur tikið við, her m.a. mongu ferðirnar saman við kenda írska rithøvundanum Tim Severin.

Í sambandi við bókaútgávuna bjóðar Listasavn Føroya almenninginum inn á gólvið í dag millum kl. 18 og 20. Tróndur fer tá at signera bókina. Listasavnið bjóðar henda dagin bókina til ein serprís, 325 kr. Vanligi útsøluprísurin er 375 kr.

Bókin er longu útkomin í Danmark og hevur hon fingið mong sera positiv ummæli. »Det er en flot opsat bog, der understreger Tróndur Paturssons storladne og unikke kunst, det berettiger ham til denne særlige opmærksomhed« skrivar listaummælarinm hjá Amtsavisen, Lisbeth Stryhn.



*Í bókini síggjast myndir av glashválvinum (igloini), sum fer at standa framman fyri Norðuratlantsbryggjuni í Keypmannahavn*



*Finn Terman Fredriksen*


HAVNAR BIO
Tlf. 31 19 56
www.bio.fo




Mikudagin 23.04. kl. 19.00
Mikudagin 23.04. kl. 21.00
Hósdagin 24.04. kl. 19.00
Hósdagin 24.04. kl. 21.00




Mikudagin 23.04. kl. 18.30
Mikudagin 23.04. kl. 23.00
Hósdagin 24.04. kl. 18.30
Hósdagin 24.04. kl. 23.00




Mikudagin 23.04. kl. 21.15
Mikudagin 23.04. kl. 23.15
Hósdagin 24.04. kl. 21.15
Hósdagin 24.04. kl. 23.15




Mikudagin 23.04. kl. 16.30
Hósdagin 24.04. kl. 16.30




Mikudagin 23.04. kl. 16.45
Hósdagin 24.04. kl. 16.45
– *Seinasta sýning*




**Frumsýnin Fríggjadagin 25.04.**

**Stórt úrval av DVD-filmum til sølu**